Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bárður á Lakjuni, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Fara stovnar landsins ov lætt um ásetingarnar í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum

Spurningar:

1. Hvørjar eru royndirnar hjá landinum við at bjóða út alment?
2. Hví verða ásetingarnar um alment útboð ikki altíð hildnar?
3. Fær tað avleiðingar, um ein stovnur undir landinum ikki heldur ásetingarnar í rundskrivinum um alment útboð?
4. Er nøkur ætlan um at lækka upphæddarmørkini fyri, nær bjóðast skal út? Um ja, nær verður hetta so gjørt?

Viðmerkingar:
Í rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum verður greitt ásett, at «Endamálið er at fáa meira fyri pening skattgjaldarans við at skipa landsins keyp av vørum og tænastum, og samstundis stimbra kappingina á føroyska vøru- og tænastumarknaðinum.»

Í svari upp á § 52a fyrispurning frá Beini Johannesen í februar 2024 sigur landsstýriskvinnan, at reglurnar í rundskrivinum ikki altíð verða hildnar. Hetta ljóðar álvarsamt, tí landsins stovnar eiga altíð at hava sum aðalmál, at peningur skattaborgarans skal nýtast við størstu virðing og skynsemi.

Verður hugt undir teigin «Farin útboð» á keypsportal.fo, ið er almenni útboðsportalurin, kann tað undra, at so fá tilboð verða umbiðin, tá hugsað verður um, hvussu nógvir og umfatandi stovnar landsins eru. Hóast rundskrivið letur upp fyri undantøkum og upphæddarmørkum, so er tað tó orðað sera greitt, tá sagt verður: «Sum meginregla eru øll keyp av vørum og tænastum fevnd av ásetingunum...» Tað er hugsandi, at mangt og mikið ikki verður boðið út, sum tað eigur at verða, og um tað er, so gongur tað í øllum førum beint ímóti endamálinum við at stimbra kappingina á føroyska vøru- og tænastumarknaðinum.

Tað kann ikki vera rætt, um tað er soleiðis, at stovnar landsins fara ov lætt um ásetingarnar í rundskrivinum um alment útboð. Tískil verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 13. novembur 2024

Bárður á Lakjuni